## Luktilsi úr kópi

Eitt nýstovnað felag í Grønlandi ætlar at fáa uppaftur meiri burtur úr tí kópi, sum grønlendingar veiða. Felagið ætlar at leggja seg eftir at fáa meiri burtur úr spikinum. Kanningar hava víst, at tað kann brúkast til heilsufremjandi kost, men at tað eisini kann brúkast til luktilsi, sigur KNR. Tað hevur annars staðið á hjá veiðimonnunum at sleppa av við kópakjøtið í ár. Skinnið hevur áhuga, men í eitt nú Paamiut hava menn tveitt kjøtið á sjógvin.



*Kanska fáa vit skjótt luktilsi úr grønlendskum kópaspiki*

*(Mynd: KNR)*

## Yvirtíð hevur avleiðingar

Er ein norsk kanning eftirfarandi, kann tað hava óhepnar avleiðingar at arbeiða ov nógva yviurtíð. Lærdi háskúlin í Bergen hevur kannað viðurskiftini hjá 10.000 norðmonnum, sum arbeiða vanliga 40 tíma viku, og fólki, sum arbeiða munandi fleiri tímar. Úrslitið var, at tey, sum arbeiðs nógva yvirtíð, líða meiri av tunglyndi og stúran enn tey, sum arbeiða vanliga tíð. ES hevur reglur, sum siga, at fólk eiga ikki at arbeiða meiri enn 48 tímar um vikuna.

# Skeivt at lata fiskiflotan far

**- Tað er ein stórur spurningur, hvussu langt myndugleikarnir kunnu lata marknaðarkreftirnar ráða einsamallar - ella lata tingini passa seg sjálvi. Tað er altíð eitt mark fyri, hvussu leingi eitt samfelag kann lata eyguni aftur fyri eini stórari kreppu, sum nærkast í so stórum lopum, sum kreppan í fiskiflotanum hesaferð ger, sigur Olaf Olsen**

FISKIFLOTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Olaf Olsen var reiðari í eini 35 ár, og fyri ta tíð førdi hann skip í eini 12 ár. Árini hjá honum til skips gjørdust eini 22 tilsamans. Olaf ber orð fyri at vera sera skilagóður, siðiligur og varð nógv avhildin av sínum manningum sum reiðari.

Vit hava spurt mannin, sum nú eftir hesi mongu ár stendur á »síðulinjuni«, hvussu hann sær upp á støðuna hjá føroyska fiskiskipaflotanum.

- Tað sær ikki gott út. Um hetta er størsta kreppa, sum fiskiflotin hevur staðið yvirfyri nakrantíð, veit eg ikki, tí tað hevur sæð dapurt út viðhvørt. Men støðan er álvarslig, eingin ivi er um tað.

Olaf vísir á, at eitt er uppog niðurgongdin í fiskastovnunum. Nøkur ár eru góð, onnur eru minni góð. Onkur fiskastovnur er væl fyri, og aðrir eru verri fyri.

- Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað ivaleyst altíð at vera.

Fyrrverandi reiðarin er onga løtu í iva um, at størsta avbjóðingin hjá fiskiflotanum í løtuni eru methøgu oljuprísirnir, serliga hjá trolaraflotanum, ið er so neyvt tengdur at oljuni.

### Eingin stýring?

Olaf Olsen sigur, at soleiðis, sum gongdin hjá lemmatrolarum og partrolarum er í løtuni, er tað ein stórur spurningur, um nakað skip megnar meira enn sjálvan raksturin - og nóg illa raksturin einans.

- Eg dugi at ímynda mær, at tað er sera stríggið at hava skipini siglandi, og hugsingur er neyvan um at rinda rentur og avdrøg hjá teimum sum fiska ísfisk við troli.

Fyrrverandi reiðarin, løgtingsmaðurin og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er ikki samdur við teimum sum siga, at myndugleikarnir bara skulu leggja allan fiskiflotan í hendurnar á marknaðarkreftunum, sum vit dagliga hoyra.

- Tað er ein stórur spurningur, hvussu langt myndugleikarnir kunnu lata marknaðarkreftirnar ráða einsamallar - ella lata tingini passa seg sjálvi, sum hann tekur til. Tað er altíð eitt mark fyri, hvussu leingi eitt samfelag kann lata eyguni aftur fyri eini stórari kreppu, sum nærkast í so stórum lopum, sum kreppan í fiskiflotanum hesaferð ger.

### Javnandi tiltøk

Olaf Olsen vísir á, at flestu



*Meðan Fram landar í Vestmanna, landar »makkarin« Vestmenningur á Hornafjørðinum*

*Mynd: Karstin Vang*

# Vestmenningur til Í

**Bæði virkini, sum keypa gulllaks í Føroyum, hava í løtuni so nógvan fisk, at Vestmenningur nú noyðist yvir á Hornafjørðin í Íslandi at landa og selja**

GULLLAKSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vestmenningur er nú á veg yvir til Íslands at landa gulllaks. Makkarin hjá honum Fram landar í Vestmanna. Skipini, sum fóru til fiskiskap seinasta leygardag, eru so gott sum fullfermd. Tey hava eini 480.000 pund inni.

Reiðarin, Tummas Christophersen, sigur, at hvørki Atlantis í Vestmanna ella Tavan í Leirvík høvdu møguleika at keypa lastina hjá Vestmenningi, tí so nógvur fiskur er niðurfyri.

Umframt Fram, sum landar í Vestmanna, landa eisini Polarhav og Stjørnan í Saltangará í dag.

Vanligt er, at Tavan keypir gulllaksin hjá Polarhavi, Stjørnuni og Eysturbúgvanum, meðan Atlantis keypir fiskin hjá Vestmenningi, Fram og Vesturbúgvanum.

- Vestmenningur landar á Hornafjørðinum, har eitt stórt pelagiskt virki er, sum kann heilfrysta eini 400 tons um samdøgnið.

Reiðarin sigur, at prísurin fyri gulllaks í Íslandi er heldur betri enn í Føroyum, men siglingin ger, at túrurin ikki loysir seg fyri reiðaríið.